tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7/2017 |
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Kambskarð Sørensen, Alvi Mortensen, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Annika Pearce, sum er tiltakslimur fyri Bjarna Hammer.

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Samanbering av skattatølum | 3 |
| 2 | Innlendis- og økismenning av ferðavinnuni og verkætlan í Suðuroynni í hesum sambandi | 3 |
| 3 | Støðutakan til spælipláss í miðbýnum | 4 |
| 4 | Uppskot um eina árliga afturvendandi umhvørvisviku á Tvøroyri | 5 |
| 5 | Froðbar Sóknar Róðrarfelag ynskir at leiga neystini hjá Eiriki Olsen | 6 |
| 6 | Havnagjald fyri M/V Galaxy - skriv til SSL | 7 |
| 7 | Eykajáttan juni 2017 - til íløgur | 8 |
| 8 | Útibarnagarðurin og útbygging av barnagarðinum | 9 |
| 9 | Uppskot til faldara viðvíkjandi dagstovninum | 9 |
| 10 | Uppskot til faldara viðvíkjandi dagrøktini | 10 |
| 11 | Góðkenning av reglugerð fyri dagrøktina hjá Tvøroyrar kommunu | 11 |
| 12 | Góðkenning av reglugerð fyri virksemi á dagstovninum hjá Tvøroyrar kommunu | 12 |




Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7/2017 |
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

13 Ráðstevna um, hvussu tvørfakliga samstarvi á barnaansingar- og skúlaøkinum kann gerast enn betur 13

14 Vinnugreinabýti í mun til A-skattainntøkur 2015/2016 14



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7/2017 |
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.00.00-I00-1-17**

## 1. Samanbering av skattatølum

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um skattatølini fyri mai mánað og árið sum heild.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Skjøl

- Skattur 2017.pdf frá fíggjarleiðaranum
- Samanbering av skatti 2016-2017.xls

**24.05.00-P20-1-17**

## 2. Innlendis- og økismenning av ferðavinnuni og verkætlan í Suðuroynni í hesum sambandi

### Málsfrágreiðing

Theresa Turidardóttir Kreutzmann og Ingibjørg Berg møttu á fund við Býráðið og greiddu frá um teirra uppskot til verkætlan til innlendis- og økismenning av ferðavinnuni í Suðuroynni.

**Vinnu- og havnanevnd, 1. maj 2017, pkt. 5:**
Í samband við at Ingibjørg Berg og Theresa T. Kreutzmann hava vitjað, ynskir nevndin at fáa tær aftur á fund at greiða frá víðari um innlendis- og økismenning.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7/2017 |
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Vinnu- og havnanevnd, 6. juni 2017, pkt. 6:**
Nevndin er kunnað um uppskotið frá CommIT, og mælir til at arbeiða víðari við málinum.
Málið verður beint í býráðið.

**Fíggjarnevndin, 8. juni 2017, pkt. 4:**
Fíggjarnevndin samtykti, at verkætlanarlýsingin er áhugaverd, og ynskir at bjóða Theresu T. Kreutzmann og Ingibjørg Berg suður á fund, at leggja fram ætlanina fyri Býráðnum á komandi býráðsfundi mánadagin 12. juni kl. 16:00.

## Avgerð

Kunning og málið verður avgreitt á komandi býráðsfundi áðrenn summarferiuna.

## Skjøl

- Uppskot Tvøroyar Kommuna
- Váttan frá Ingibjørg Berg um fund

**04.03.00-P20-1-14**

## 3. Støðutakan til spælipláss í miðbýnum

## Málsfrágreiðing

Býráðið, at taka støðu til tilmæli hjá fíggjarnevndini um spælipláss í miðbýnum.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevnd, 6. juni 2017, pkt. 5:**
Nevndin mælir til at gera spælipláss á matr. nr. 453a, ið er ogn hjá kommununi.
Málið verður beint í býráðið.

**Fíggjarnevndin, 8. juni 2017, pkt. 5:**
Fíggjarnevndin mælir til, at gjørt verður spælipláss á lendi omanfyri øki hjá BankNordik/Posta samsvarandi tilmæli um nýtsluloyvi, sum Heilsu- og innlendismálaráðið í skrivi, dagfest 14. juni



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri



2016, hevur tilmælt. Fíggjarnevndin mælir til, at arbeiðið verður sett í verk sum skjótast. Hetta tilmæli verður sent Býráðnum til endaliga støðutakan.

### Avgerð

Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini um, at gjørt verður spælipláss á lendi omanfyri øki hjá BankNordik/Posta samsvarandi tilmæli um nýtsluloyvi, sum Heilsu- og innlendismálaráðið í skrivi, dagf. 14. juni 2016, og at ger av undirlendið verður boðið út alment. Umsitingin ger meting í tí sambandi.

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin tekur aftur sítt tilmæli.

### Skjøl

- Spælipláss
- HIMR0001.pdf
- Vedr.: Viðv. gerð av virknum býarrúmi á økinum omanfyri Bank Nordik /Posthúsið

**09.00.00-4-17**

## 4. Uppskot um eina árliga afturvendandi umhvørvisviku á Tvøroyri

### Málsfrágreiðing

Uppskot um eina árliga afturvendandi umhvørvisviku á Tvøroyri, har ymiskir træðrir í mun til umhvørvis-spurningar kunnu verða savnaðir saman og avgreiddir

**Trivnaðar- og umhvørvisnevnd, 6. juni 2017, pkt. 2:**
Nevndin tekur undir við at kommunan skipar fyri árlig afturvendandi umhvørvisviku, helst samstundis sum Tvøroyrar Skúli.

**Fíggjarnevndin, 8. juni 2017, pkt. 6:**
Fíggjarnevndin mælir til, at fylgja tilmælinum frá trivnaðar- og umhvørvisnevndini, at kommunan skipar fyri einari árligari afturvendandi umhvørvisviku, helst samstundis sum Tvøroyrar Skúli og saman við ítróttar- og áhugafeløgum. Málið beint í Býráðið til endaliga støðutakan.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 7/2017 |
|---|---|
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum hjá trivnaðar- og umhvørvisnevndini og fíggjarnevndini, at kommunan skipar fyri einari árligari afturvendandi umhvørvisviku, helst samstundis sum Tvøroyrar Skúli og saman við ítróttar- og áhugafeløgum. Peningur setast av á komandi fíggjarætlan til hesa umhvørvisviku.

### Skjøl

- VS: SV: Umhvørvisvika

**03.12.01-I00-1-16**

## 5. Froðbar Sóknar Róðrarfelag ynskir at leiga neystini hjá Eiriki Olsen

### Málsfrágreiðing

Froðbiar Sóknar Róðrarfelag (FSR) ynskir at leiga neystini hjá Eiriki Olsen.

**Fíggjarnevndin, 8. juni 2017, pkt. 9:**
Fíggjarnevndin mælir til, at Tvøroyrar kommuna ger leigusáttmála við Froðbiar Sóknar Róðrarfelag (FSR) um leigu av neystunum, sum kommunan júst hevur keypt frá Eiriki Olsen fyri 450. tús. kr. FSR ber allar útreiðslur av leigusáttmálanum og fíggjarnevndin mælir til, at gjaldið verður kr. 1.000,- um árið. Málið verður lagt fyri komandi býráðsfund 12. juni til endaliga støðutakan.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og tí leigusáttmála millum Tvøroyrar kommunu og FSR, sum umstingin hevur gjørt, og sum borgarstjórin las upp fyri býráðslimum á fundinum. Leigugjaldið er kr. 500,- árliga.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7/2017 |
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Skjøl

- Bræv til Tummas Sørensen við samtykt frá fíggjarnevndini í sambandi við leigu av FSR neystunum.
- Bræv við samtykt frá fíggjarnevndini í.s.v. leigu av FSR neystunum
- Umsókn frá Froðbiar Sóknar Róðrarfelag

**08.01.00-G01-1-17**

## 6. Havnagjald fyri M/V Galaxy - skriv til SSL

### Málsfrágreiðing

Málið um havnagjaldið hjá Galaxy, sum avloysti Smyril herfyri, til fíggjarnevndina til viðgerðar.

**Fíggjarnevndin, 8. juni 2017, pkt. 11:**
Fíggjarnevndin samtykti, at beina málið til viðgerð í Býráðnum.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at umsitingin arbeiðir víðari við at fáa inn havnagjaldið frá Strandferðsluni fyri ta tíðina, tá M/V Galaxy avloysti Smyril herfyri.

### Skjøl

- Dagsordenspunkt: Havnargjald fyri M/V Galaxy behandlet på mødet 27. april 2017 kl. 11:30 (Býráðsskrivstovan) i Vinnu- og havnanevnd (2017).docx
- MV Galaxy.docx
- SV: Uppskot til skriv til SSL um havnagjald fyri M/V Galaxy
- Uppskot til skriv til SSL um havnagjald fyri M/V Galaxy
- Samskifti millum borgarstjóran og Chris Jan Michelsen
- Rokningar sendar SSL
- 1073 galaxystrandferðslan - Havnagjald.pdf



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 7/2017 |
|---|---|
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.30.18-A00-1-17**

## 7. Eykajáttan juni 2017 - til íløgur

### Málsfrágreiðing

1. viðgerð av eykajáttan til íløgur á kr. 2.529.025,- løgd fram til góðkenningar hjá Býráðnum.

**Fíggjarnevndin, 8. juni 2017, pkt. 10:**
Fíggjarnevndin samtykti við 1. viðgerð eykajáttanina til íløgur.

### Avgerð

Kristina Kambskarð Sørensen metti seg ógegniga, at viðgera partar av eykajáttan av íløgum fyri 2017, Tí fór Kristina av fundinum kl. 17:45 í sambandi við hetta pkt. á dagsskrá.

Býráðið samtykti einmælt við 1. viðgerð eykajáttanina til íløgur fyri 2017.

Kristina Kambskarð Sørensen møtti aftur á fundi kl. 17:50.

### Skjøl

- Eykajáttan juni 2017 - samlað yvirlit
- Yvirlit eykajáttan juni 2017
- Sundurgreinan av íløgum



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7/2017 |
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**27.00.00-6-14**

## 8. Útibarnagarðurin og útbygging av barnagarðinum

### Málsfrágreiðing

Forkvinnan í sosialu nevnd ynskir, at umrøða útibarnagarðin við atliti útbygging av barnagarðinum. Tilmæli frá sosialu nevnd til endaliga góðkenning í Býráðnum.

**Sosiala nevnd, 1. juni 2017, pkt. 1:**
Sosiala nevnd mælir til, at tað við støði í núverandi uppskoti til útbygging av barnagarðinum verður fyrireika ein stova afturat til útibarnagarðin, sum verður tilknýtt barnagarðin, men staðsett eitt sindur fyri seg sjálvan. Hetta tilmæli verður beint til víðari viðgerð í Býráðnum.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at taka støðu til, um ein stova skal byggjast uppí verandi uppskot til útbygging av barnagarðinum, tá ein kostnaðarmeting er komin frá Brim Arkitektum.

### Skjøl

- Mýrifipan_Útferð við Bygginevnd_UmStovnar.pdf

**00.13.00-2-17**

## 9. Uppskot til faldara viðvíkjandi dagstovninum

### Málsfrágreiðing

Kari Petersen, dagstovnaleiðari, hevur í samstarvi við Bjarna Nygaard, trivnaðarfólkið, latið úr hondum uppskot til vælkomst faldara til dagstovnin, sí viðfesta faldara, sum er góðkendur av sosialu nevnd, og sum nú verður kunnaður um til Býráðið.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7/2017 |
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Býráðið, 18. mai 2017, pkt. 5:**

Býráðið tók kunningina til eftirtektar og beindi málið til nærri viðgerð í sosialu nevnd.

**Sosiala nevnd, 1. juni 2017, pkt. 2:**
Sosiala nevnd samtykti, at taka undir við uppskoti til faldara á dagstovnaøkinum, sum verður beint víðari til Býráðið sum kunning.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at taka undir við tilmælinum frá sosialu nevnd og góðkendi vælkomst-faldaran á dagstovnaøkinum.

### Skjøl

- Faldari - barnaansingarøkiðKARIendaligakurvaður

**00.13.02-10-17**

## 10. Uppskot til faldara viðvíkjandi dagrøktini

### Málsfrágreiðing

Dagrøktarleiðari, Marit Poulsdóttir, hevur í samstarvi við Bjarna Nygaard, trivnaðarfólkið, latið úr hondum uppskot til vælkomst faldara til dagrøktina, sí viðfesta faldara, sum er góðkendur av sosialu nevnd, og sum nú er til kunning hjá Býráðnum.

**Býráðið, 18. mai 2017, pkt. 6:**

Býráðið tók kunningina til eftirtektar og beindi málið til nærri viðgerð í sosialu nevnd.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7/2017 |
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Sosiala nevnd, 1. juni 2017, pkt. 3:**
Sosiala nevnd samtykti, at taka undir við uppskoti til faldara í dagrøktarskipanini, sum verður beint víðari til Býráðið sum kunning.

**Avgerð**
Býráðið samtykti einmælt, at taka undir við tilmælinum frá sosialu nevnd og góðkendi vælkomst-faldaran á dagrøktarøkinum.

### Skjøl

- Faldari - dagrøktin, nýggjasta útgáva 1. juni

**28.00.00-2-16**

## 11. Góðkenning av reglugerð fyri dagrøktina hjá Tvøroyrar kommunu

### Málsfrágreiðing

Uppskot til reglugerð fyri virksemi í dagrøktini hjá Tvøroyrar kommunu til viðgerð og góðkenning hjá Býráðnum, sí viðfestu reglugerð.

**Býráðið, 18. mai 2017, pkt. 8:**

Býráðið tók kunningina til eftirtektar og beindi málið til víðari viðgerð í sosialu nevnd.

**Sosiala nevnd, 1. juni 2017, pkt. 4:**
Sosiala nevnd samtykti, at taka undir við reglugerð fyri dagrøktina í Tvøroyrar kommunu. Sosiala nevnd beindi málið til endaliga støðutakan í Býráðnum.

**Avgerð**

Býráðið samtykti einmælt, at taka undir við tilmælinum hjá sosialu nevnd um, at góðkenna reglugerðina fyri virksemi á dagrøktarøkinum.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7/2017 |
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Skjøl

- Reglugerð fyri virksemi í dagrøktini (endalig)

**28.09.00-A00-1-17**

## 12. Góðkenning av reglugerð fyri virksemi á dagstovninum hjá Tvøroyrar kommunu

### Málsfrágreiðing

Uppskot til reglugerð fyri virksemi á dagstovninum hjá Tvøroyrar kommunu til viðgerð og góðkenning hjá Býráðnum sí viðfestu reglugerð.

**Býráðið, 18. mai 2017, pkt. 7:**

Býráðið tók kunningina til eftirtektar og beindi málið til nærri viðgerð í sosialu nevnd.

**Sosiala nevnd, 1. juni 2017, pkt. 5:**
Sosiala nevnd samtykti, at taka undir við reglugerð fyri dagstovnin í Tvøroyrar kommunu. Sosiala nevnd beindi málið til endaliga støðutakan í Býráðnum.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at taka undir við tilmælinum hjá sosialu nevnd um, at góðkenna reglugerðina fyri virksemi á dagstovnaøkinum.

### Skjøl

- Reglugerð fyri virksemi á dagstovninum (endalig)



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 7/2017 |
|---|---|
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.01.10-A00-13-17**

## 13. Ráðstevna um, hvussu tvørfakliga samstarvi á barnaansingar- og skúlaøkinum kann gerast enn betur

### Málsfrágreiðing

Uppskot til ráðstevnu í oktober mánaða 2017 í mentanarhúsinum SALT á Drelnesi við evninum "Hvussu kann tvørfakliga samstarvi í mun til børn á stovni, í dagrøkt og í skúla mennast og gerast enna betur". Bólkur við umboðum frá barnaansingar- og skúlaøkinum skal fyrireika ráðstevnuna.

**Sosiala nevnd, 1. juni 2017, pkt. 6:**
Sosiala nevnd tók undir við hugskotinum um at hava nevndu ráðstevnu í heyst. Sosiala nevnd helt tað vera skilagott, at Tvøroyrar kommuna stuðlar ráðstevnuni við einari ávísari upphædd, men at ráðstevnan eisini verður fíggja við luttakaragjaldið.

Sosiala nevnd ynskir at koma við á ein fund við fyrireikingarbólkin, tá bólkurin hevur havt nakrar fundir.

### Avgerð

Býráðið tók undir við, at tað verður fyriskipa ein ráðstevna í heyst um tvørfakligt samstarv á barnaansingarøkinum, Býráðið beinir málið aftur til fyrireikingarbólkinum, sum kemur við einum tilmæli til sosialu nevnd. Síðani verður tikið við aftur til næsta býráðsfund.

### Skjøl

- Notat við samanumtøku av fundi 30. mai 2017



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 7/2017 |
|---|---|
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**24.00.00-I00-1-17**

## 14. Vinnugreinabýti í mun til A-skattainntøkur 2015/2016

### Málsfrágreiðing

Kunning um A-skattainntøkur býtt út á vinnugreinar á Tvøroyri árini 2015 og 2016.

### Avgerð

Borgarstjórin kunnaði um A-skattainntøkur í mun til vinnugreinabýti fyri 2015/2016, sum Býráðið tók til eftirtektar.

Skjøl

- Útgreining - A-inntøkur á vinnugreinar
- 20170515 Vinnugreinabýtið 2015-16 Tvøroyrar Kommuna.xlsx

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7/2017 |
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 18:20**

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Kristina Kambskarð Sørensen

Alvi Mortensen

Bogi Johannesen

Súsanna Bertholdsen

Annika Pearce



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7/2017 |
| Fundardagur | 12. juni 2017 kl. 17:00-18:20 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan